almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



KREA

# Samskipari innan kunning og leiðslu til stjóraskrivstovuna

*Gerið so væl at merkja brævbjálvan: "Samskipari".*

Samskiparin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og framtíðini.

Okkara ynski er, at samskiparin hevur politiskt og fyrskipanarligt tev og er virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevnir og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovnurin hevur.

Samskiparin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran og umfatar í høvuðsheitum samskipan av leiðsluuppgávum, fyrireikandi og uppfylgjandi uppgávur í sambandi við fundarvirksemi á leiðslustøði. Harumframt er stórur partur av arbeiðinum at samskipa kunning og samskifti innanhýsis á stovninum og viðvíkjandi myndugleikum og borgarum.

Starvið umfatar eisini samskifti og samstarv við aðrar almennar stovnar, feløg og áhugabólkar, uppgávur viðvíkjandi norðurlendskum samstarvi.

Umframt hetta umfatar starvið eisini yvirskipaðar uppgávur á starvsfólkaøkinum og aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

Vit sóknast eftir einum fólki, ið hevur útbúgving frá hægri lærustovni, hevur góðan kunnleika til kunningartøkni, kunnleika til almenna fyrisiting, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 353510, ella við at fara inn á heimasíðu okkara www.almannastovan.fo, ella www.portal.fo.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 14. mei 2008 kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Almannastovan,
Smyrilsvegur 20,
Postsmoga 3096,
FO-110 Tórshavn.



# Avloysari til kaðaldeildina hjá FT Net

**Við hesum verður søkt eftir fólki til kaðalarbeiði hjá FT Net - Miðøkið, sum fevnir um Streymoy, Vágar og Sandoy. Arbeiðsuppgávur aðrastaðni í landinum kunnu koma fyri.**

Talan er um eitt tíðaravmarkað starv til setan skjótast til ber og fram til 29. august 2008.

Vit kunnu bjóða einum komandi starvsfelaga eitt fjølbroytt starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um kaðalgrevstur, kaðallegging og annað fyrifallandi innan økið.

Førleikakrøv:
- Koyrikort til lastbil
- BE-Kort
- Tað er ein fyrimunur, um tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert fyrikomandi og jalig/ur.

Starvið er tímalønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Andreasen, bólkaleiðara, tlf. 243673 ella til Starvsfólkadeildina tlf. 303030.

Umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 8. mai 2008.

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
ella: starvsfolkadeildin@ft.fo

ft•net

